VIÐMERKINGAR

# Ikki velja tað, sum ikki ber til

**Sjúrður Skaale**
*Tjóðveldisflokkurin*



Góði veljari.

Hevði tú klárað at havt tvey fulltíðarstørv samstundis, og røkt bæði til lítar?

Hevði tú klárað tað um annað starvið var í Føroyum og hitt í Danmark?

Nei. Tað hevði tú ikki. Tí tað ber ikki til.

Hugsa um tað 8. februar.

Og vel ein, sum arbeiðir.

# Fleiri fáa jørð í hendi, løgtingsmál nr. 31

**Heðin D Poulsen**
*Føroya Óðalsfelag*

Verður uppskotið hjá Kára Højgaard samtykt, fara fleiri føroyingar at fáa møguleikan at ogna sær jørð og forða verður fyri at øll jørðin fer á nakrar fáar hendur.

Fyri ikki so langari tíð síðani megnaði Bjarni Djurholm tað, sum mangur landsstýrismaður í búnaðarmálum man hava droymt um, hann setti skjøtul á eina nýggja tíð fyri landbúnað í Føroyum.

Føroya Jarðarráð er avtikið og nýggj búnaðarlóg er samtykt, og farast kann nú undir eina endurnýggjan av lóggávuni um føroyskan landbúnað, bæði tí vinnuliga partinum og tí partinum, sum fyri tað mesta verður nýttur til ítriv og trivnað, tí almenna og tí privata. Tað eru tey, sum eiga jørð ella vilja eiga jørð, sum Føroya Óðalsfelag arbeiðir fyri, og gleðin er stór í Óðalsfelagnum, nú broytingar eru á veg.

26. januar í ár legði Kári Højgaard fram uppskot um broyting í matrikullógini. Uppskotið gevur teimum, sum eiga jørð, sama rættin, sum aðrir ognarir hava, rættin at ráða yvir egnum ognum. Somuleiðis ger uppskotið tað møguligt hjá teimum ognarleysu at keypa jørð. Verandi støða forðar fyri at nýggir eigarar kunnu koma til og setur sostatt kílar ímillum okkara gomlu mentan við seyðahaldi o.ø. og framtíðina. Verður matrikullógin ikki broytt til at nøkta tann tørvin, sum er á at keypa og selja jørð, doyr áhugin fyri jørðini út, og endin er, at nakrir fáir einstaklingar eiga ella festa meginpartin av jørðini í Føroyum.

Orsøkirnar til at verandi matrikullóg hevur brúk fyri ábótum eru nógvar. Ein orsøk er, at við verandi skipan kann eigarin ikki ráða yvir sínari ogn sum hann vil, hann kann ikki selja burturav ella veðseta eftir vanligum vinnuligum reglum og teytum. Hetta ger at jørð bert verður seld í stórum lutum og gerst sostatt óvanliga dýr fyri ein, sum vil keypa fyri fyrstu ferð, men samstundis uppá seg lítið verd hjá tí, sum selur, tí hann verður noyddur at selja alt ella einki. Undantakið er tó, at hann sum longu eigur, honum kann verða selt.

Bjarni Djurholm hevur gjørt tað, sum fyrr varð hildið at vera ómøguligt, nú tá tingmenn leggja fram uppskot um fleiri broytingar, er tað at fegnast um. Føroya Óðalsfelag vónar sostatt, at uppskotið hjá Kára Højgaard fær eina megnar undirtøku frá restina av tingmanningini. Hetta uppskot kann birta frískar vónir og trúgv til eina aldargamla mentan, sum er serstøk føroysk.

# Christiansborg, er tað eitt stað har vit eiga at vera umboða?

**Martin Dam**
*Listi E*

Hetta er ein spurningur vit í Føroyum hava fullan rætt at seta okkum. Tí sum ein borgari her í Føroyum vilja vit vita hvat verður smoygt niðuryvir okkum.

Sjálvandi er mín áskoðan, at vit skula ikki bara fáa upplýsing um tingini, men eisini ávirka sum mest í málum ið gagna og viðkoma Føroya fólki og landinum.

Tað mest umráðandi hjá einum umboði úr Føroyum er, at ein ikki innlimar sína ávirkan inn í danskan partapolitikk, men at ein allatíðina hevur Føroyar í tonkunum tá arbeitt verður.

Ein atkvøða fyri Lista E, er ein atkvøða í arbeiðir fyri Føroyar, meðan ein atkvøða fyri ABC-flokkarnar er danskur partapolitikkur, har umboði ikki fær arbeitt fyri Føroyar tí tey innlima seg í danskar flokkar, og harvið missa tey frælsi til ávirkan.

Tjóðveldisflokkurin hevur verði Tjóðveldisflokkurin eisini á fólkatingið, har er eingin bróyting. Og prógvast kann at ávirkanin ið er nú, ikki er lítil. Men hon hevði veri enn størri um bæði umboðini høvdu umboða Tjóðveldisflokkin og harvið Føroyar.



Hetta er ikki ein spurningur um fullveldi ella samband, tí loysingin kemur ikki at vera tikin í Danmark, men úr Føroyum. Tí kunna øll trygt velja Lista E, vit vilja arbeiða fyri øllum Føroyum.

Til tygum ið ikki kunna velja Lista E av einari ella aðrari grund. Eg vil heita á teg um velja blankt fyri at tín atkvøða ikki skal enda innanveggja í einum donskum flokki.

Gott væl øll somul.

# Javnstøða – ein felags avbjóðing

TÍÐINDASKRIV
*frá Almanna- og Heilsumálaráðnum*

Árni Magnússon, almanna- og javnstøðumálaráðharri í Íslandi, var í døgunum 19. til 21. januar á væleydnaðari vitjan hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni. Endamálið við vitjanini var at kunna politikarar um arbeiðið við javnstøðu í Íslandi. Árni Magnússon hevði 20. januar framløgu á Hotel Hafnia fyri løgtingslimum, landsstýrismonnum, Javnstøðunevndini og øðrum.

**Arbeiðið fyri javnstøðu - royndir úr Íslandi**

Í fyrra umfari røddi Árni Magnússon um ta vitan og tær royndir, sum arbeiðið fyri javnstøðu hevur borið við sær í Íslandi.

Altingið samtykti verandi javnstøðulóg í 2001. Endamálið við javnstøðulógini er at fremja og arbeiða fyri javnrætti millum kynini á øllum økjum í samfelagnum. Hetta endamál verður rokkið við at arbeiða fyri eins ávirkan millum kvinnur og menn á avgerðir og á politikk; við at arbeiða fyri, at tað verður gjørligt at sameina arbeiðslív og familjulív hjá bæði kvinnum og monnum; við at betra støðuna hjá kvinnum og økja um teirra møguleikar í samfelagnum; við at økja um upplýsing um javnstøðumál, og við at greina hagtøl sambært javnstøðuhugsjónini og við at økja um javnstøðugransking.

**Almenna arbeiðið fyri javnstøðu**

Almenna arbeiðið fyri javnstøðu er sambært javnstøðulógini býtt í tríggjar partar: Javnstøðuskrivstovan, Javnstøðuráðið og Kærunevndin í javnstøðumálum. Javnstøðuskrivstovan er ein fyrisitingarligur stovnur, sum hevur til uppgávu at hava eftirlit við javnstøðulógini, at skipa fyri undirvísing og upplýsing um javnstøðu, at ráðgeva um javnstøðu og at gera tilmæli til javnstøðuráðharran, og annað praktiskt arbeiðið, javnstøðu at frama. Javnstøðuráðið, sum verður sett eftir hvørt altingsval, hevur umboð fyri arbeiðsmarknaðin, kommunur, landsfyrisitingina, kvinnufelagsskapir og onnur. Javnstøðuráðið hevur til uppgávu at arbeiða fyri javnstøðu millum kvinnur og menn á arbeiðsmarknaðinum. Í Kærunevndini í javnstøðumálum sita 3 løgfrøðingar. Ráðharrin í javnstøðu-málum velur ein lim, og Hægsti rættur velur 2 limir. Kærunevndin hevur til uppgávu at viðgera einstøk mál og at gera metingar um, hvørt talan er um brot á javnstøðulógina.

Eitt ár eftir hvørt altingsval skal ráðharrin í javnstøðumálum leggja fyri Altingið eina ætlan fyri, hvussu stjórnin arbeiðir við javnstøðumálum í valskeiðnum.

**Verkætlanir til frama fyri javnstøðu**

Lógin um javnstøðu hevur tryggjað kvinnum og monnum somu rættindi, men sambært Árna Magnússyni hevur hon ikki tryggjað kvinnum og monnum somu veruligu støðu í samfelagnum. Til tess at betra um støðuna hjá kvinnunum hevur stjórnin tískil sett sær fyri at skipa fyri verkætlanum á ymsum økjum. Eitt dømi um eina tílíka verkætlan er eina tvørpolitiska nevnd at arbeiða fyri at økja um luttøkuna hjá kvinnum í politikki. Nevndin gjørdi eitt framúrskarandi arbeiði í 1999, tá talið á kvinnum í Altinginum øktist frá 25% til 35%.

**Lønarmunur**

Sambært Árna Magnússyni er ein av teimum týdningarmestu uppgávunum at javna lønarmunin millum kvinnur og menn, sum enn er sera stórur í Íslandi. Langt er eftir á mál, áðrenn eins løn verður veruleiki.

**Lóg um barnsburðarfarloyvi**

Í seinna umfari røddi Árni Magnússon um ta nýggju lógina um barnsburðar- og foreldrafarloyvi, sum kom í gildi í 2001. Lógin er eitt víðgongt tiltak fyri at fremja javnstøðu á arbeiðsmarknaðinum og fyri at byggja brýr millum arbeiðs- og familjulív.

Lógin gav pápum rætt til barnsburðarfarloyvi, sum ikki kann verða flutt til mammurnar. Eisini ásetti lógin endurgjald fyri barnsburðarfarloyvi, sum í stóran mun bøtir fyri lønarmissin.

Við lógini hava mammur rætt til barnsburðarfarloyvi í 3 mánaðir, pápar hava rætt til barnsburðarfarloyvi í 3 mánaðir, og 3 mánaðir kunnu foreldrini býta sínámillum. Tað samlaða barnsburðarfarloyvið fyri hvørt barn er sostatt 9 mánaðir.

Ein barnsburðargrunnur umsitur barsilsgjaldið. Grunnurin fær inntøkur frá tí almenna, og frá arbeiðsgevarum, sum gjalda eitt ávíst prosenttal av teirra tryggingargjaldi í grunnin.

Gjaldið til móttakaran er 80% av miðallønini í tey seinastu tvey árini innan barnsburðin. Móttakarin fær tó ikki meira enn 80% av 600.000 íslendskum krónum (sum eru umleið 55.000 danskar krónur).

Lógin um barnsburðarfarloyvi hevur av álvara vunnið frama millum íslendskar pápar, sum í øtkum tali nýta høvið at fara í barnsburðarfarloyvi. Í 2003 vóru 84,3% av pápunum í barnsburðarfarloyvi.

Síðani lógin kom í gildi, eru galdandi reglur broyttar nakrar ferðir, tí tað er so at siga ógjørligt at kenna allar teir óvæntaðu spurningarnar, sum kunnu stinga seg upp. Arbeitt verður støðugt við at gera tillagingar, soleiðis at foreldur at pinkubørnum fáa størsta gagn burturúr barnsburðarskipanini.

Fyrilestrarnir hjá Árna Magnússyni eru at finna á www.ahr.fo

# Gjald fyri valgreinar

Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka gjald fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið, hetta fram til fólkatingsvalið.

Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**